## Duga illa at samráðast um løn

- Danskir leiðarar duga ikki nóg væl at samráðast um sína egnu løn. Teir halda veruliga at teir duga, men kenslurnar fara ofta við teimum. Tað heldur í øllum førum stjórin, Keld Jensen í Marketwatch, ið er ein altjóða ráðgevingarfyritøka við sergrein í samráðingarteknikki. – Nógvir leiðarar eru ótilvitaðir og ódugnaligir í samráðingarstøðum. Teir ímynda sær, at hetta er nakað sum teir duga, tí at teir sum leiðarar hava roynt hetta nakrar ferðir. Men flestu teirra hava ikki lært at nýta samráðingar sum eitt professionelt amboð, og teir hava tí ikki gjørt sær greitt, hvat teir ætla sær, sigur hann. Teir gerast ístaðin kenslubornir og beinleiðis stoyttir, um teir ikki fáa tað sum teir ynsktu sær.



# Tungolja setir Fuglafjørð á

## Úr Kyrrahavinum á Fuglafjørð

Eitt dømi um at Fuglafjørður av sonnum er komin á heimskortið, er dømið um stóra hollendska frystiskipið sum keypti tungolju frá Faroe Bunkers fyrr í summar.

Skipið hevði roynt úti fyri peruansku strondini í Kyrrahavinum, men eftir at kvota teirra var uppi har, avgjørdi reiðaríið at skipið skuldi í Norðuratlantshavið at royna.

Hollendska reiðaríið hevði onkursvegna hoyrt um møguleikan at keypa olju hjá Faroe Bunkers, og valdi at royna hesa loysnina, samstundis sum teir kundu skifta manning.

Ikki nóg mikið við tað, at skipið keypti hundraðtals tons av olju. Nú teir kortini vóru á Fuglafirði, kundu teir tað sama keypa trolútgerð frá Vónini.

- Hetta er eitt gott dømi um tann týdning sum Faroe Bunkers kann koma at hava fyri okkum. Hetta fer uttan iva at kasta pening av sær í framtíðini, slær borgarstjórin Sigurð Simonsen fast.

## Fyrispurningar hvønn einasta dag

- Tað gongur ikki dagur at vit ikki fáa fyrispurningar um sølu av tungolju, sigur Janus Rasmussen, stjóri í Faroe Bunkers.

Hann er samdur við borgarstjóranum í, at Fuglafjørður av álvara er komin á heimskortið, tí áhugin fyri fyritøkuni er stórur og alsamt vaksandi.

Støddin á skipunum sum vilja keypa »føroysku« tungoljuna er ymisk, úr sløkum 200 metrum og upp í væl omanfyri 300 metrar.

Tann stóri spurningurin og avbjóðingin er, um hesi skipini kunnu leggja at í Fuglafirði ella í framtíðini fara at kunna gera tað. Ein forðing og avmarking í hesum er kortini hon, at sleipikapasateturin ikki er nøktandi í dag.

Janus Rasmussen verður í starvi hjá Faroe Bunkers henda mánaðin at enda.

**184 metrar langa liberiska farmaskipið »Antarois Breeze«, sum týsdagin lastaði tungolju í Fuglafirði, er enn eitt dømi um, at Faroe Bunkers er við at gerast kent kring allan heimin. – Vit síggja stórar møguleikar í hesum virkseminum, sigur Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði**

OLJUSØLA

*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** - Fyritøkan hevur longu víst, at grundarlag er fyri henni. Og vit vænta í roynd og veru at kunna selja millum 70 og 80.000 tons um árið, sigur ein bjartskygdur borgarstjóri.

Fuglfirðingar eru so smátt farnir at venja seg við at stór skip leggja at við oljubryggjuna í býnum. Her steðga tey nakrar tímar og fara síðani fult lessað við tungolju til fiskiskap ella víðari út í Atlantshavið við farmi sínum.



*- Stórur áhugi er fyri virkseminum hjá Faroe Bunkers, sigur Janus Rasmussen, sum bert verður stjóri í fyritøkuni henda mánaðin út*



Her er fyrst og fremst talan um lasting av tungolju, men lítil ivi man vera um, at virksemið hjá Faroe Bunkers fer at spjaða seg til aðrar fyritøkur í Fuglafirði og fer at kasta pening av sær í økinum.

Síðani Faroe Bunkers byrjaði at selja tungolju í byrjanini av juli mánaði, er tungolja í stórum tali til eina stóra nøgd av skipum farin um bryggjukantin.

- Eg verði ikki kløkkur, um dupult so nógv tungolja verður seld hiðani um nøkur ár, sigur Sigurð Simonsen.

### Grundarlag

Tá farið varð undir Faroe Bunkers fyrr í summar var tað sjálvandi við einum ávísum spenningi, um nú tørvurin fór at gerast eins stórur og ætlanin miðaði eftir.

Hóast fyritøkan bert hevur verið á marknaðinum í slakar tríggjar mánaðir, hevur hon longu víst, at grundarlag er fyri henni – og at góðir møguleikar eru